TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Barnaansingin

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar 64 dagrøktarar, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

Býlingshúsið Inni á Gøtu

Í býlingshúsinum ganga 42 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við 21 børnum í hvørjari. Á stovninum eru 9 starvsfólk.

Býlingshúsið millum Gilja

Í Býlingshúsinum millum Gilja ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum. Á stovninum eru 12 starvsfólk.

www.torshavn.fo

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

Býlingshúsið Inni á Gøtu eftir:
- tveimum pedagogum í barnagarðsstovu at byrja 1. mars 2004.

Leiðari Poula Eidesgaard, tlf. 317701
Ovaragøta 30A
FO 188 Hoyvík

Býlingshúsið millum Gilja eftir:
- tveimum pedagogum 30 tímar um vikuna í barnagarðsstovu við 3 til 7 ára gomlum børnum at byrja 1. mars 2004
- einum pedagogi 40 tímar um vikuna í vøggustovu við 0 til 3 ára gomlum børnum at byrja 1. mars 2004

Leiðari Kirstin Djurhuus, tlf. 318372
Postboks 3165
FO 188 Hoyvík

Vit ynskja
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meiri fæst at vita
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. februar 2004.

Móttøka

Í sambandi við at vit hava latið upp nýggjan
skraddaraverkstað og vakurleikastovu,
bjóða vit til móttøku mánadagin 19. januar kl. 16.00–18.00

Skraddararnir
Beinta & Sólvør
Tlf: 270096/257800

Cosméto
vakurleiki og vælvera
Maria, góðkendur kosmetologur
Tlf: 318070

Niels Finsensgøta 38, kjallarin

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3709
Navn: Sp/f Berg Shipping Ltd.
Adressa: Niels Finsensgøta 23, 100 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 03.12.2003
Viðtøkudato: 03.12.2003
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Torleivur Magni Mikkelsen, Marknagilsvegur 55, 100 Tórshavn, Samskip hf, Holtabakka v/Holtaveg, 104 Reykjavík, Ísland og Olíudreifing ehf, Geljutanga, 104 Reykjavík, Ísland.
Nevnd: Hørður Gunnarsson, Hlaðhamrar 13, 104 Reykjavík (formaður), Torleivur Magni Mikkelsen, Marknagilsvegur 55, 100 Tórshavn, Hentzar Steingrímsson, Grønalíð 12, 100 Tórshavn og Pálmar Óli Magnússon, Austurúni 5, 225 Bessastaðahreppi, Ísland.
Stjórn: Torleivur Magni Mikkelsen, Marknagilsvegur 55, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 03.12.2003 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at reka reiðaravirksemi og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 13. januar 2004

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2473, P/F Seta, 826 Trongisvágur.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Ansgar Sørensen, 826 Trongisvágur (formaður), Viberg Pauli Sørensen, 826 Trongisvágur og Hans Pauli Henryson, 800 Tvøroyri.
Innkomin í nevndina: Anita Henryson, 800 Tvøroyri (formaður), Armgarð K. Sørensen, 800 Tvøroyri og Ragnar Sørensen, 826 Trongisvágur.

Skráseting Føroya tann 15. januar 2004.

Kristin Balle

www.sosialurin.fo

Ogn til sølu

Sørvágs kommuna lýsir hervið matr. nr. 51 til sølu.

Ognin fevnir um eitt grundøki í miðbygdini á 96 kvm. við ástandandi eldri sethúsum og hjalli.

Sethúsini og hjallur eru í vánaligum standi, og er treytin fyri sølu at keypari innan ávísa tíðarfreist bindur seg til at seta hús og hjall í stand, samsvarandi nærri ásetingum frá kommununi. Hesar ásetingar fevna í høvuðsheitum um at bygningar uttandura verða endurreistir í upprunalíki ella samsvarandi.

Nærri fæst at vita við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 33 20 04.

Skrivlig boð skulu latast kommununi seinast 2. februar 2004.

Boð skulu latast inn í afturlatnum brævbjálva merktur: Boð matr. 51.

Sørvágs kommuna

Leiðari søkist

til Mentanarhúsið Atlantis at seta 1. mars 2004.

Arbeiðið umfatar:
- at skipa fyri mentanartiltøkum, filmsframvísan o.ø.
- at arbeiða í tøttum samstarvi við stýrið Klaksvíkar Sjónleikarafelag, Norðurlandahúsið og Havnar Bio
- allar vanligar leiðsluuppgávur

Umsøkjarin skal vera fyrikomandi, kreativur, hugskotsríkur og ábyrgdarfullur.

Lønar- og setanartreytir sambært avtalu við stýrið.

Umsóknarfreistin er 1. februar 2004

Mentanarhúsið Atlantis
Box 320
FO-700 Klaksvík

Hevur tú spurningur kanst tú ringja
tel 21 57 69 - 22 03 66 - 75 50 72

Timburmaður

Søkt verður eftir timburmanni at byrja beinanvegin á meginøkinum.

Áhugað kunnu venda sær til tlf. 449270, 219270 ella 227255

JKH ENTREPRENØRAR
Tlf 44 92 70 - 22 72 55 - Fax 44 92 71
• JORD & BETONG
• TIMBURARBEIDI
• NUS - HUS - NUS

Sosialurin
-tað loysir seg

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Dagstovnurin við Landavegin

Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og fýra vøggustovum við 12 børnum í hvørjari. Stovnurin kann tó umskipast alt eftir um tørvur er á vøggustovu ella barnagarðsplássum

Leiðari til nýggja Dagstovnin við Landavegin

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Dagstovnin við Landavegin, sum eftir ætlan letur upp í august mánaði 2004.

Vit ynskja at tú
- ert útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur teldukunnleika
- ert opin fyri møguligum bygnaðarbroytingum innan økið
- sært møguleikar framum forðingar

Setanarviðurskifti
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra tlf. 31 51 60.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 9. februar 2004.

www.torshavn.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Peter Qvortrup Geisling frá "Lægens Bord" verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 31. januar kl. 15.00 og á Hotel Norð sunnudagin 1. februar kl. 19.00. Atgongumerkir til Norðurlandahúsið kunnu keypast í Norðurlandahúsinum og á Kunningarstovuni. Atgongumerkini til Hotel Norð kunnu keypast á Statoilstøðini í Klaksvík.

MÅNEDENS BUKET

Í samband við at Peter Qvurtrup Geisling frá "Lægens Bord" vitjar Føroyar síðst í januar, kunnu allir føroyingar nú innstilla onkran í Føroyum, til at fáa "Månedens Buket".

Kennir tú onkran innan fyri tað føroyska heilsuverkið, sum tú heldur hevur útmerkað seg á ein serligan hátt, so kanst tú innstilla henda persón.

Tað kann verða ein lækni, sjúkrasystir, portørur, heimasjúkrasystir, heimahjálpari, o.s.fr. Eisini kunnu fólk innstillast, sum hava t.d. lagt eitt stórt arbeiði í ein serligan felagskap ella uppgávu.

Ein serlig nevnd hyggur ígjøgnum øll innkomin brøv, og verður "Månedens Buket" handað á fyrilestrinum, sum verður í Norðurlandahúsinum 31. januar 2004.

Skriva navnið á tí persóninum, sum tú heldur hevur uppiborið eitt heraklapp, og hví tú heldur at júst hesin skal hava hetta blómutyssi.

Sosialurin 141080

SPURNINGAR TIL "LÆGENS BORD"

Hava tygum onkran áhugaverdan spurning um heilsu- og heilsurøkt, - ella um okkurt heilt annað, ið tygum ynskja at seta sjónvarpslæknanum frá Lægens Bord, so kunnu tygum senda hann til IRIS.
Teir mest spennandi og áhugaverdu spurningarnir, verða svaraðir á fyrilestrunum.

IRIS
Postsmoga 240 · FO-700 Klaksvík
Tel 456390 og 216390 · Fax 456391
teldupostur: iris@iris.fo
heimasíða: www.iris.fo